TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Stjórnarskrivstovan

Dagfesting
26. september 2018

Løgtingsins Umboðsmaður
Undir Bryggjubakka 11
Postrúm 2008
110 Tórshavn

Okkara j.nr.
18/03527-2

Málsviðgeri
Olga Knudsen

Tygara j.nr.

**Talgild plássbókingarskipan á dagstovnaøkinum**

Víst verður til skriv umboðsmansins, dagfest 21. september 2018, (j.nr.: LUM-30- 18/00094) um talgilda plássbókingarskipan á dagstovnaøkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst til tíðindaskriv frá kommununi um nýggju talgildu plássbókingarskipanina, har foreldur til tess at bóka pláss skulu rita inn við MínLykil, og at kommunan sendir váttan um MínBoks.

Vísandi til onnur mál um talgildar skipanir spyr umboðsmaðurin kommununa um heimildina at krevja, at borgarin skal samskifta talgilt við Tórshavnar kommunu og á kravið um skráseting í MínBoks.

Kommunan ásannar, at slíka heimild hevur hon ikki.

Vegna tess, at farið verður frá bíðilista til bóking – tað merkir, at foreldur ikki longur søkja um pláss, og um einki er tøkt, verða sett á bíðilista, men nú skulu bóka sær eitt ítøkiligt tøkt pláss at byrja ein ítøkiligan dag – fer kommunan at skipa mannagongd fyri tey foreldur, sum ikki brúka talgildu skipanina.

Mannagongdin verður hon, at oyðiblað verður tøkt á heimasíðuni hjá kommununi www.torshavn.fo. Oyðiblaðið verður eisini at fáa í Snarskivuni. Foreldrini fylla oyðiblaðið út og lata Snarskivuni tað. Tá Snarskivan hevur eftirkannað upplýsingarnar, bókar Snarskivan pláss í skipanini. Foreldrini vátta síðani bókingina við handskrivaðari undirskrift.

Talgilda skipanin og serliga mannagongdin, lýst omanfyri, verður alt klárt at seta í verk 2. oktober 2018.

Vinarliga
k. v.

Jóan Petur Hentze
trivnaðarstjóri